## Holst er kaldur sum ein fiskur

Soleiðis skrivar heimasíðan hjá Silkeborg, eftir at føroyski landsliðsleikarin bjargaði teimum eitt stig í dagsins dysti í móti Esbjerg. Innskifti Christian Lamhauge Holst javnaði til endaliga úrslitið 1-1, og var ikki lítið frekur, tá hann lyfti bóltin upp um málverjan, eftir at hann varð spældur leysur av Jesper Bech og javnaði. Tað er eitt sindur ymiskt, hvussu danskir miðlar umtala málið. Allir eru á einum málið um, at tað var væl úr hondum greitt av Holst, men teirra lýsingar av støðuni eru kortini ymiskar. Mest merkisverdu eigur heimasíðan hjá Silkeborg, sum skrivar soleiðis: »Christian Holst var kold som en fisk foran Lukas Hradecky, som han stille og roligt vippede bolden over og bagefter kunne se sin afslutning hoppe i et tomt mål. 1-1 på et flot udført mål af Holst.« Tað kom eisini av sonnum fer á framrættaða spælið hjá Silkeborg, eftir at Christian Lamhauge Holst kom á vøllin. Málið fall eitt korter eftir, at hann kom á vøllin og níggju minuttir fyri leiklok var tað um reppi, at hann legði Silkeborg á odda við frísparki, men málverjin bjargaði frálíka skotinum.



# Vantandi virðing fyri sjálvbodna arbeiðinum

**ÍSF Tað kom dátt við, tá stjórnin hjá ÍSF kundi staðfesta, at tað sjálvbodna arbeiðið, sum verður gjørt í ítróttarfeløgunum kring alt landið, nú skal svíða fyri at fáa Løgtingsfíggjarlógina fyri 2011 at hanga saman**



*Petur Elias Petersen, ÍSF-forseti*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Uni Holm Johannesen

– Vit standa spyrjandi og undra okkum yvir hugburðin, sum landið vísir. Boðskapurin hongur ikki saman. Tað er rørsluár í ár, har tað eisini frá politiskari síðu verður víst á, hvussu týdningarmikið tað er, at fólk røra seg og íðka ítrótt undir skipaðum viðurskiftum.

Tað skrivar Petur Elias Petersen, forseti í ÍSF, í tíðindaskrivi.

Hóast játtanin til ítróttina stórt sæð bara er lækkað seinastu 20 árini, hevur Løgtingið, í uppskotinum fyri 2011, valt at skera enn eina hálva millión krónur av stuðlinum, sum Løgtingið letur Ítróttarsambandinum, og har við føroyskum ítrótti.

Tað kemur illa við hjá forsetanum.

– Tá vit annað hvørt ár senda okkara ítróttaungdóm at umboða Føroyar á Oyggjaleikum, fáa vit eisini váttað frá politiskari síðu, hvussu týdningarmikið arbeiðið er, sum verður gjørt innan føroyska ítrótt. Tað sama er galdandi, tá okkara fremstu ítróttarfólk koma heim við glitandi altjóða heiðursmerkjum um hálsin, skrivar Petur Elias Petersen.

### Missa stuðul

Men tað sæst bara ikki aftur í politikkinum, heldur hann.

Miðskeiðis í rørsluárinum 2010, meðan sersambondini fyrireika seg til oyggjaleikirnar á Isle og Wight næsta summar, komu boðini frá almennari síðu, at tað skal skerjast enn eina hálv millión krónur av stuðlinum til ítróttina.

Tað skal síggjast í ljósinum av, at ÍSF hevur longu mist stuðulin til ein ítróttarráðgeva, umframt, at ein millión krónur vóru skornar av stuðlinum til fótbóltin í sambandi við ólavsøkupakkan í fjør.

Her við hevur ítróttin mist 1,85 millión krónur seinastu trý árini. ÍSF hevur hinvegin fingið 600.000 krónur at stuðla úrvalsítrótti, sum Ítróttarsambandið sanniliga fegnast um, men tað kemur ikki breiðu ítróttini til góðar, vísir Petur Elias Petersen á.

– Stjórnin í ÍSF harmast um gongdina, tí tað er eisini á øðrum økjum, at ítróttin er fyri vanbýti. Eitt nú fingu vit lyfti um eina mvgafturbering, tá stuðulsskipanin til ítróttaanlegg og samkomuhús fór úr gildi, men hóast givin politisk lyfti, er einki víst í verki í hesum máli, skrivar hann.

### Skilja ikki støðuna

Niðurstøðan hjá Ítróttarsambandinum er, at politiska skipanin hevur als ikki skilt ómetaliga stóra virði í tí, sum sjálvboðin í ítróttarlívinum kring Føroyar gera dag og dagliga.

Í mun til nógv annað, sum pengur verður játtaður til á løgtingsfíggjarlógini, er tann hálvan milliónin, sum nú verður skorin frá ítróttini, piparnøtur, og tað er samlaða upphæddin til ÍSF á 4,75 milliónir krónur eisini, heldur forsetin.

– Verður uppskotið samtykt í verandi líki, verður tað til stóran skaða fyri tað, sum vit hava roynt at bygt upp í ÍSF seinastu árini. Vit hava tvey starvsfólk í umsitingini, har av annað er ítróttarráðgevi. Umsitingin kann ikki skerjast meira, annars dettur øll samskipanin av ítróttini sundur, skrivar Petur Elias Petersen.

### Vónar tað besta

Skerjingin av játtanin fer í høvuðsheitum at ganga út yvir ítróttarliga virksemið hjá Ítróttarsambandinum og sersambondunum.

Petur Elias Petersen vísir á, at tað verður væntað, at landslið detta niðurfyri, og tað sama er galdandi fyri førleikamennandi skeið av eitt nú venjarum og dómarum.

– Tað harmonerar ómetaliga illa saman við tí veruleika, at alt fleiri føroyingar íðka ítrótt í skipaðum feløgum, samstundis sum heilsumyndugleikar og politiskir myndugleikar eggja øllum til at røra seg meira, skrivar forsetin.

Ætlanin er næsta ár at seta kostin á dagsskránna. Eins og við rørsluárinum metir ÍSF seg hava týdningarmikla uppgávu fyri at broyta vanarnar hjá føroyingum, og serliga tí uppvaksandi ættarliðnum, á eina heilsubetri kós.

– Men kann tað fremjast við einari lækkandi játtan?, spyr forsetin í ÍSF.

*uni@sosialurin.fo*

# Hotdogs og kips tæna ongum endamáli

**ÍSF Ítróttarsambandið sær ein trupulleika í matinum, sum verður borðreiddur til ítróttartiltøk**

Uni Holm Johannesen

Tað sigur Annika Lindenskov, sum er ítróttarráðgevi í Ítróttarsambandinum.

Hon nevndir sum dømi, at maturin, sum vanliga er til keyps í ítróttarhøllunum kring landið er ikki tann heilsubesti. Franskir hotdogs og kips stuðla ikki ítróttarfólkunum at fremja sítt besta, tá tey skulu á vøllin.

– Tá tey ikki kunnu keypa á ítróttarøkinum, fara tey ungu ofta í onkra nærliggjandi bensinstøð ella kiosk at keypa. Hóast sølustøðirnar ofta hava góða frukt á tilboði, so er tað ikki fruktini, sum tey ungu fara eftir, og tað er spell, boðar Annika Lindenskov frá í tíðindaskrivi.

Ítróttarfeløgini hava biðið um hjálp og vegleiðing um, hvussu keðiligur vanarnir hjá teimum yngru kunnu broytast, og stjórnin í Ítróttarsambandinum hevur sett sær fyri at brúka kostárið, sum er í 2011, at broyta gongdina.

*uni@sosialurin.fo*